## DAGSINS MEINING

### Meiri til gransking og nýggjar vinnumøguleikar!

Vit eru í einum búskaparligum stígi. Tað ásanna øll í vinnuni - fíggjarheimurin, búskaprfrøðingar, løntakarar og vinnulívsfólk - og tað sæst eisini aftur í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2006.

Landsstýrið hevur tí skotið upp at seta meiri pening av til løgur fyri at hava fólk í arbeiði. Harafurat hevur landsstýrið borið so í bandi, at hesar løgur verða kring alt landið, soleiðis at flest møgulig fáa inntøku frá hesum arbeiðum.

Serliga legur landsstýrið dent á, at Suðuroyggin er tað økið, sum næsta ár fær mesta ágóðan av íløgunum. Fyrst og fremst tí, at oyggin hevur verið rakt av fleiri búskaparligum hóttaføllum. Bæði í tí stóru kreppuni og eisini í seinri árum. Virki í bæði Vági og í Hvalba hava verið latin aftur í longri og stytri tíðarskeið. Harafturat var alivinnan, sum gav nógvum fólkum arbeiði, fyri einum álvarsomum bakkasti.

Løgurnar í Suðuroynni eru fyrst og fremst í undirstøðukervið - Hovstunnilin, men eisini í nýggjan miðnámsskúla.

Tað er í fínasta lagi, at landsstýrið skýtur upp at økja løgurnar í komandi fíggjarlóg. Hesin politikkur er í samljóð við ástøðið hjá búsaparfrøðingnum, Keynes, um at tað almenna skal brúka pening, tá einskilda vinnan heldur aftur. Og øvugt.

Hesar nevndu íløgurnar koma sjálvandi fólkinum og vinnuni, sum býr í Suðuroynni til góða, tí tunnilin bøtir um undirstøðukervið og skúlin bøtir sum frálíður um førleikan hjá fólkinum, her býr.

Tað, vit afturímóti kanska sakna í uppskotinum til fíggjarlóg, eru tankar um og uppskot um, hvussu vit meiri miðvíst økja inntøkuna hjá føroyska samfelagnum. Skulu vit hava ein sterkan og sum frálíður ein sjálvberandi búskap mugu vit hava fleiri vinnuvegir, sum kasta meira pening av sær.

Eitt er "ígongdsetarastuðul" - stuðul at fara undir virksemi - kanska alternativt virksemi til fiskivinnuna, og eitt annað er gransking. Nógv er sagt og skrivað um gransking seinastu tíðina, men tað skerst ikki burtur, at vit eru eftirbátur, tá tað kemur til gransking - serliga einskilda vinnulívið, sum liggur aftarliga, um vit samanbera okkum við onnur norðurlond.

Ein av undangongumonnunum í føroyska nútíðarsamfelagnum, Atli Dam, plagdi onkuntíð at siga, at vit skulu "framleiða" okkum úr kreppum.

Vit eru ikki í eini kreppu, men hava ein búskaparligan stíg. Tí eigur løgmaður, Jóannes Eidesgaard, at leggja størri dent á tað, hann segði á síðsta valfundinum undan seinasta valið. Og tað var at leggja orku í at økja vinnumøguleikarnar og inntøkuna hjá føroyska samfelagnum, so Føroyar gerast eitt enn betri stað at búgva í.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Størsta inntriv nakrantíð í Kollafirði

**- samtykt av Tórshavnar Býráð uttan viðmæli frá Kollfjarðarnevndini eftir hoyringsfreist**



**Ben Arabo**
*Oyrareingir*

Býráðið samtykti í apríl at broyta ídnaðarøkið inni á Oyrareingjum til havnaøki, og samstundis var ein havnaútbygging samtykt, har "byggingin er partur av eini heildarætlan". Vit vóru nøkur sum bóðu um innlit í málið og hugdu at hesi góðu heildarætlan. Henda heildarætlan um eina risastóra bingjuhavn er ein ørvitisætlan, sum oyðileggur Kollafjørð fyri komandi ættarlið, og kemur við tíðini at niðurleggja sunnara arm av fjørðinum sum búpláss. Allur tann innari parturin av Kollafirði verður ein keikantur og einki annað, og um borgarar í Kollafirði og í kommununi annars sóu nakrar av niðurstøðunum í tilfarinum, sum liggur til grund fyri bingjuhavnsætlan býráðsins, so høvdu teir øtast. Hesar niðurstøður vóru ikki lagdar fram á sonevnda kunningarfundinum hjá Tórshavnar kommunu í mars mánað í ár. Leggjast kann afturat, at friðingarmyndugleikarnir ikki hava viðgjørt hesa heildarætlan.

Borgarar í Kollafirði skrivaðu so eina kæru, meðan broytingin var til hoyringar. Henda kæra er so viðgjørd og havnameistarin vil, ikki óvæntað, halda fast um ætlanina, og havnanevndin og byggi- og býarskipanarnevndin hava samtykt at taka undir við tilmælinum.

Nú átti Kollfjarðanevndin sjálvsagt, sum hinar nevndinar, at tikið støðu til um tey framvegis vilja viðmæla ella frámæla ætlanini eftir at hoyringssvarini eru komin inn. Men nei, her hevur man so snilt frá býráðsins síðu syrgt fyri einari "kunning" uttan niðurstøðu. Úrslitið er, at fyrsta stig í størsta inntriv nakrantíð í Kollafirði var samtykt á býráðsfundi 6 oktobur, uttan viðmæli frá Kollfjarðarnevndini, eftir at kærurnar vóru tiknar við í málið.

Tað er við einari ávísari skepsis, at eg lesi litfaldaran um eina grønari Tórshavnar Kommunu, tá míni børn kunnu síggja fram til ein Kollafjørð undir asfalti og betong við bingjum til útsikt. Hetta verður úrslitið, tá man nú setur skjøtil á eina havnabygging, ið, sum býráðið so fínt sigur tað, "er ein partur av eini heildarætlan".

Vónandi er síðsta orðið ikki sagt í hesum máli. Livst so spyrst.

# Góð tíðindi - eldraøki út til kommunnunar



**Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur.**
*http://heima.olivant.fo/~eydgunn*

Nú um dagarnar sigur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, at hann fer at royna at fáa semju í samgonguni um at leggja eldraøkið út til kommununar. Sæð frá okkara sjónarhorni úti í kommununum eru hetta góð tíðindi. At fáa tey økir út ið beinleiðis viðvíkja okkara borgarum, hava vit longi ynskt og arbeitt fyri.

Hans Pauli Strøm vísir á, at royndirnar við barnansingini hava víst, at kommunan kennir betur tørvin hjá sínum borgarum og er skjótari at byggja út fyri at nøkta henda tørv, enn landið er - hetta kann ein ikki annað enn vera samdur í.

Eldraøkið er ikki so einfalt at umsita sum barnaansingin. Hetta kann tó gerast við at landið setir krøv til størri eindir og samstarv millum kommunur, sum gjørt er við barnaforsorgarlógini. Eisini mugu ásetast minstu krøv til tænastuna til tey eldru. Verður hetta gjørt, so ivist eg onga løtu í, at eldraøkið ferð at verða líka væl umsitið úti í kommununum sum barnaansingin er tað.

Tjakast verður um, hvør best kennir tørvin ella er nærri borgaranum landið ella kommunan. Tey ið ikki vilja, at økið verður lagt út, føra fram, at landið er so lítið, og at ein umsiting er nokk. Hetta kann ljóða gott og einfalt. Mínar royndir í 8 ár innan kommunala økið vísa, at einstaka kommunan kennir nógv betur tørvin hjá borgaranu, og er før fyri at nøkta hann ofta, uttan at hetta viðførir meira umsiting.

Í dag hava vit heimarøktina, røktarheim, vistarheim og sambýlir. Hesi tilboð eru ikki skipað sum ein eind. Verður økið kommunalt, kann tað skipast við einari leiðslu, einum stað at skriva seg upp til røkt og einari upptøkunevnd, ið kann visitera umsøkjarar inn á tann stovn ið júst passar til hansara tørv. Henda skipan vil viðføra, at tørvurin í kommununi verður lýstur og viðgjørdur á einum stað. Umsitingin kann gerast einfaldari og tað verður lættari at geva teimum eldru tilboð, ið samsvara við teirra tørv.

Fíggingin av teimum økjum, ið vera løgd út hevur stóran týdning. Royndirnar við barnaansingini eru, at kommununnar bert fingu ein lítlan part av tí peningi ið økinum tørvaði frá landinum, tá ið ansingin var løgd út. Henda sannroynd hevur viðvirkað til, at kommunurnar ynskja at økini skulu fíggjast við at landsskatturin skal lækka og kommunuskatturin hækka samsvarandi. Møguliga er hetta ein góð skipan. Tað sum eigur at hava týdning fyri Javnaðarflokkin er, hvat vit gera við tað sannroynd, at kommunuskattaskipanin vendir tunga endan niðureftir? sum skipanin er í dag, so fara tær lágu inntøkurnar at bera ein lutvíst størri part av kostnaðinum av økjum, ið verða løgd út til kommununar, um kommunuskattaskipanin ikki verður broytt. Hetta kann ikki vera Javnaðarpolitikkur, og tí er tað mín vón, at flokkurin ferð at royna at finna eina haldgóða loysn fyri henda partin eisini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.